## Farnir til fiskiskap aftur

**Hirtshals/Skagen:** Nakrir bátar eru farnir avstað aftur til fiskiskap, nú veðrið er batnað. Atlantsfarið og Saksaberg eru útfarnir, skrivar heimasíðan bkv.fo. Ruth er komin aftur úr Týsklandi har hon hevur landað. Strømnes liggur eisini inni í løtuni. Beinir sum hevur ligið í Skagen er eisini á veg nú til nýggjan túr.



## Nýtt sjóverjuflogfar

Íslendska sjóverju- og bjargingartænastan fær næsta ár eitt spildurnýtt flogfar til sítt virksemi. Flogfarið, sum stendur í gerð, er av kanadiska slagnum Dash-8 Q300 og verður ætlandi klárt at taka í nýtslu á sumri næsta ár. Flogfarið er sera vælútgjørt til eftirlit og bjarging og hevur alla nútímans tøkni og bjargingarútgerð. Flogfarið kann flúgva 2.100 fjórðingar í einum og mesta ferðin er 258 fjórðingar um tíman, skrivar Vísir.

*Soleiðis fer nýggja flogfarið at síggja út (Mynd: Vísir)*

# Ein fiskidagabanki kann gerast úrslitið

**Javnaðarflokkurin, Tjóðveldi og Miðflokkinum eru tríggjar flokkar, sum duga at síggja teir stóru trupulleikarnar í okkara fiskivinnu og sum eisini eru sinnaðir at taka teir upp, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður. Tað er ein orsøk til, at hann hevur boðið júst teimum flokkunum til samráðingar um eina nýggja samgongu, tí hann heldur ikki, at teir trupulleikarnir kunnu loysast saman við Fólkaflokkinum**

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein fiskidagabanki kann vera eitt gott boð upp á úrslitið av samgongusamráðingunum ímillum Javnaðarflokkin, Miðflokkin og Tjóðveldi.

Tað heldur løgmaður.

Hann sigur, at teir tríggir flokkarnir, sum nú samráðast um eina nýggja samgongu, eru tríggir flokkar, sum ásanna tann stóra trupulleikan, sum okkara høvuðsvinna er í –og sum eru sinnaðir at fremja tær neyðugu broytingarnar í vinnubygnaðinum.

Og tað er ein politiskur málsetningur, sum tað neyvan ber til at røkka saman við Fólkaflokkinum, heldur hann.

Tað er alneyðugt at tað er alneyðugt at fremja broytingar í fiskivinnuni og tað eru hesi tríggir flokkarnir sinnaðir til.

- Tann stóri trupulleikin er, at vit hava eina skipan, sum gongur til 2018 og at ongin enn veit, hvussu fiskivinnan skal skipast eftir tað.

- Tað er bara um 10 ár og reiðarafelagið hevur eisini sóknast eftir eini greiðari politiska fráboðan um, hvussu vinnan skal skipast eftir tað.

Løgmaður sigur eisini, at tað er ein stórur trupulleiki, at tað er komin so nógv spekulatión í fiskivinnuna, at teir, sum nú hava ognað sær skip, noyðast at seta seg í ovurstóra skuld, tí fiskiloyvini eru so dýr.

- Tað ger, at raksturin hongur ikki saman og tað er ein stórur trupulleiki. Tað eru ikki sjálv skipini, sum eru so dýr. Tað eru fiskiloyvini, sum kosta so nógv at ogna sær og tað er hesin trupulleikin, sum má loysast.

Og tað er ein trupulleiki, sum Jóannes Eidesgaard hevur góðar vónir um at CHE samgonga klárar at loysa.

Er tað ein fiskidagabanki, sum er loysnin upp á tann trupulleikan?



*Eg havi góðar vónir um, at tað eydnast at loysa grundleggjandi trupulleikar í okkara fiskivinnu saman við Miðflokkinum og Tjóðveldinum, sigur Jóannes Eidesgaard. Saman við Fólkaflokkinum hevði tað neyvan borið til, leggur hann afturat*



*Jóannes Eidesgaard sigur, at javnaðarfólk taka fult undir við royndunum at skipa samgongu við Tjóðveldið og Miðflokkin. Her er hann á floksleiðslufundi leygardagin. Høgrumegin situr Pauli Einarsson, formaður í Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag*

## Fingu fullan stuðul at halda fram

**Leiðslan í Javnaðarflokkinum hevur givið Jóannesi Eidesgaard og tingmanningini fullan stuðul at halda fram við samráðingunum um eina samgongu við Tjóðveldi og Miðflokkin**

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var rættiliga gott lag á fundinum hjá floksleiðsluni í Javnaðarflokkinum leygardagin seinnapartin.

Floksleiðslan er ovasti myndugleiki hjá Javnaðarflokkinum og tað er vanligt, at hon tekur støðu til, hvørja samgongu flokkurin skal vera við í.

Og leygardagin varð hon kallað saman at taka støðu til, um tey stuðla tingmanningini í royndini at skipa nýggja samgongu millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Miðflokkin.

Eftir fundin, har eini 30-40 umboðsfólk hjá flokkinum kring landið vóru møtt, kundi ein vælnøgdur floksformaður staðfesta, at hann hevði fingið fullan stuðul at halda fram við samráðingunum um CHE samgonguna.

- Tað var ein ótrúliga jaligur hugburður ímóti at royna hesa nýggju leiðina í føroyskum politikki, segði Jóannes Eidesgaard, beint eftir fundin.

Hann sigur, at hann legði ætlanina um at royna CHE samgonguna fyri floksleiðsluna og leiðslan gav honum fullan stuðul fyri kúvendingina, sum var hend í samgongusamráðingunum, eftir at løgmaður krøkti bæði Sambandsflokkin og Fólkaflokkin av og boðsendi Tjóðveldinum og Miðflokkinum til fundar at tosa um samgongumøguleikarnar.

Fyrireikandi fundirnir í CHE hava gingu so mikið væl, at leygardagin løgdu tey eina arbeiðsætlan fyri, hvussu sjálvar samráðingarnar skulu skipast. Tað merkir, at eitt møguligt samgonguskjal er býtt sundur í nakrar undirbólkar, sum ymisk umboð fyri hvønn flokkin so skulu viðgera og farið varð undir veruligu samráðingarnar í morgun.

- Málið er at hava eina nýggja samgongu í pottinum leygardagin, tá ið Løgtingið skal setast.

Tá ið vit spyrja løgmann um hann hevur betri vónir um at røkka á mál við hesi royndini, kemur bara klassiska svarið:

- Onki er liðugt fyrrenn alt er liðugt.

## Jørgen ligið sjóvarfallið av sær

**Tað var nakað seint, at hann kom í tankar um, at ein sjálvstýrissamgonga kundi verið ein møguleiki, heldur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum**

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Jørgen Niclasen var nakað seinur á sjóvafallinum.

Tað er viðmerkingin frá Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisfloksins til seinasta útspælið frá Fólkaflokkinum.

Eftir at ABC samráðingarnar slitnaðu í gjár, boðar formaður Fólkafloksins, Jørgen Niclasen, frá, at hann heldur, at besta boðið upp á landsins leiðslu, hevði verið ein ADEH sjálvstýrissamgonga.

-Tað hevði verið sera spennandi fyri sjálvstýrisfólk, um fullveldissamgongan gjørdist veruleiki, sigur Jørgen Niclasen.

Høgni Hoydal fegnast um nýggju tankarnar hjá Fólkaflokkinum.

Tað er bara tað, at nú er ov seint.

- Bæði eftir síðsta løgtingsval og eftir løgtingsvalið leygardagin, royndu vit í Tjóðveldinum at fáa Fólkaflokkin við í eina sjálvstýrissamgongu, men tað hevði ongan áhuga.

- Beinanvegin eftir valið, gjørdu vit greitt, at vit vóru til reiðar at skipa eina sjálvstýrissamgongu saman við Fólkaflokkinum, men tá av.

- Nú er støðan broytt, tí nú hava vit sett okkum til borðs saman við Miðflokkinum og Javnaðarflokkinum at samráðast um eina nýggja samgongu og tær samráðingarnar taka vit í størsta álvara, sigur Høgni Hoydal.

- Hevði fráboðanin frá Fólkaflokkinum komið fyrr, hevði tað verið áhugavert, leggur hann afturat.